

*Jóan Jacob var við Sprite saman við Niclas á Trappuni*



*Byggingin av Rituvík var eitt megnar avrik*



*Fyrstu niðursetufólkini Per og Nicolina Højgaard*



*Ommu- og abbadøtur Per og Nicolinu. Hesar eru tilsamans 330 ár. Tvíburarnir t.v. Antona og Petra standa. Frammanfyri sita Nena og Mona*

Nevniliga Per, Dánjal Pauli og Hans Pauli Højgaard, ið allir eru brøður. Per er nú elsti maður, o.u. 85 ár.

Vit fóru til kongsbóndan og bóðu um loyvi til at seta okkum niður her, og vit fingu straks játtandi svar. Tá vit komu higar var alt oyðið og deytt og kundi mest samanlíknast við ein stóran hamara.

Rituvík er tiltikið brimpláss, fjøran her er ógvuliga ring. At gera ein stiga til at ganga upp og niður í var tí nakað, sum vit alt fyri eitt fóru í holt við. Tað var ikki altíð tespuligt á náttartíð at taka stigan upp fyri ódnarveðri. (Nógv ár aftaná gjørdu statur og løgting eftir áheitan brúgv oman á rókina.)

Eitt tað fyrsta arbeiðið, vit fóru undir, var at laga upp garðarnar. Síðan varð við ídni drivið á at arbeiða upp á jørðina. Nógv torv varð skorið í gerðunum, og mógvurin var sera góður. Tá varð ofta farið til Havnar og aðrar staðir við torvi. Ikki var altíð so lagaligt at arbeiða, og sjáldan vóru vit meira enn tveir mans í einum 8-mannafari fullum av torvi. Fyrst var at bera torvið í leypum tann ofta drúgva veg frá krónni oman til bátin. Og tá ið vit komu til Havnar var at blaka alt torvið upp úr bátinum til hvønn einstakan, ið vildi hava torv

Tað var ikki altíð eins hugnaligt at føra torv hiðani frá til aðrar bygdir. Veðrið var ofta óálítandi, og mangar hættisligar og vandamiklar ferðir hava vit havt gjøgnum tíðirnar. Eg fór eina ferð einsamallur til Klaksvíkar í einum fýramannafari fullum av torvi. Tað var ein drúgvur teinur at rógva, motorar høvdu vit jú ikki, men eg kom tó í øllum góðum fram báðar vegir.

Eina aðru ferð vóru vit tveir, ið skuldu til Havnar við torvi. Tá vit komu hálvan vegin, fingu vit knappliga sterkan mótvind (útsynningsveður). Vindurin vaks í hvørjum og hótti við at hvølva bátin. Tað var ikki annað at gera enn at seta segl á bátin og sigla til Kollafjarðar, har vit seldu torvið. (Rituvíkingar fóru um aldarskifti í "torvverkfall" fyri at fáa meira fyri torvið. Tað endaði við, at prísurin fyri leypin fór frá 40 uppí 42½ oyru fyri leypin. Hetta mettu havnarmenn at vera ein okurspris!)

## Lagt inn so við og við

Alt hetta stóra strekki, ið nú útgerð Rituvík, hava vit gomlu lagt inn so við og við. Dúgliga varð arbeitt upp á jørðina, og vit veltu nógv korn. Eitt árið hevði eg sjey tunnur av korni og hartil nógv av eplum. Sornhús høvdu vit, og meðan konufólkið turkaði, lótu vit av við teimum.

Soleiðis hevur Rituvík so við og við vaksið seg fram til eina bygd, ið nú telur um 30 hús. Stórur framburður er hendur her í tí farna tíðarskeið.

Nú á døgum má unga mannfólkið fara til skips. Her hava verið heima í summar bert 11 manns, alt gamlir menn frá 40-50 ár og uppeftir.

## Strævin útróður

Um veturin kann brimgangurin vera óførur í Rituvík. At tað ikki altíð hevur verið líka tídligt at rógva hiðani – serliga áðrenn brúgvin kom – sigur seg sjálvt.

Eina ferð vóru vit norðuri í havi. Eg var sjálvur sætti á báti. Knappliga skiftist veðurlagið, og brátt leikaði landsynningsódn við miklum veldi. Og harðan fingu vit andróður. Tað var so, vit knarvaðu upp land og komu á Oyndarfjørð. Vit løgdu okkum undir landið fyri at royna at eta ein bita. Eg kølnaði tá so brádliga av tí knappliga steðginum, at tað var sum at hiti ikki kom aftur í kroppin. Tveir fjórðingar róðu vit nú, til vit komu har hús vóru. Eg fór niðan í bygdina at fáa okkum heitt at drekka. Allir vóru illa komnir, summir næstan meira deyðir enn livandi. Sum eg gekk niðan eftir og nærkaðist húsunum, glentaðu tenninar í høvdinum á mær. Eg var væl fagnaður av húsfólkinum og fekk heitt drekka til bátsfelagar mínar, ið tá skjótt mentust aftur. Vit høvdu fiskað væl, men í óveðrinum mistu vit línuna, sum eiðismenn tó bjargaðu okkum dagin eftir.

Eina aðra ferð vóru vit úti á havi um veturin, seks manns og nógv var at fiska. Tá kom hann eystan av vindi og kava, og vit mistu burtur land. Veðrið ruskaði, vit kundu ikki koma inn á Rituvík og máttu tí halda sunnanfyri Eystnes. Vit noyddust at kasta fisk út – einki land at sjá – og veðrið versnaði. Hann brast á við ræðuligum kavaroki. Vit mettu okkum at vera komnar inn um Eystnes. Men nú við eitt setur ein av monnunum í eitt hart róp: "Land forút." Rópið var ikki meira enn tagnað, tá ið ein annar tekur til at rópa enn harðari og andskræmiligari: "Sker forút." Tá skiltu vit, at "landið" var flesin útfyri (Hoyvíks)hólmin, og vit vóru klárir yvir, hvussu nær vit høvdu verið deyðanum. Náttin var nú komin. So dánt vunnu vit til Havnar og avreiddu har. Tað var nú klárnað í, og frá Havn var straks farið til Nes, har vit drógu bátin upp. So varð gingið til Rituvíkar, so skjótt vit vóru førir fyri at ganga. At gleðin har var stór yvir at síggja okkum aftur skilja øll, serliga av tí, at fólk vóru farin at bera ótta fyri, at vit ikki skuldu spyrjast aftur í aftur.

## Hevði ikki tíð til at bjarga sjónini

Kona Jóan Jákup, Johanna, var av Nesi. Tað er ikki longur síðan enn í summar, at Jóan Jákup einsamallur gekk eftir koyrivegnum frá Rituvík til Saltangará og heimaftur. Sjálvur var hann við til ar arbeiða uppá vegin, hóast blindur kundi hann bora og annað eins og aðrir. Og Johannu ger enn sum áður alt innanhýsis arbeiði einsamøll, og torv ber hon nú sum fyrr. Hon hevur verið og er manninum ein góður og trúgvur stuðul. Sjey børn fingu tey, seks synir og eina dóttir. Ein sonur er deyður, meðan ein annar, Adrian, er giftur í Havn. Hinir fýra hava bygt í Rituvík og sita á stykkinum hjá pápanum. Dóttirin giftist til Oyndarfjarðar.

Tað eru 18 ár síðani Jóan Jákup byrjaði at verða blindur. Undir krígnum fór hann eitt árið við gamla Smirli til Keypmannahavn og lá tá tríggjar vikur á ríkishospitalinum. Men sjálvt teir kønu læknarnir har kundu ikki hjálpa honum. Heim aftur komin til Føroyar dró hin mikli sjóhugurin hann av nýggjum til skips. Hann varð fyrst blindur á tí vinstra eyganum. Úti á havinum kundi hann tá leggja mið, bøla o.a. Men so byrjaði sjónin at hvørva eisini á høgra eyga. Eitt árið var hann norðuri í Klaksvík, og ráddi læknin honum til at fara til danska læknan Metz, ið tá virkaði í Suðuroy. Hr. Metz ætlaði eisini at fara í holt við eyga, men av tí at tað vildi taka so langa tíð, helt Jóan Jákup seg at enda undan.

Hann kundi ikki so leingi forsøma arbeiðið fram fyri "behandlingina". Og hann gjørdist tí starblindur.

Her kann nevnast, at tað hevur í hvussu er verið ein annar blindur fiskimaður, og tað var Dánjal Christiansen í Nýggjubúð í Skálavík.